# Kunngerðablaðið A

2013 Givið út 23. desember 2013

Nr. 161 19. desember 2013

**Kunngerð**
**um**
**skipan av fiskiskapinum eftir svartkjafti við fiskiførum undir føroyskum flaggi í 2014**

Við heimild í § 9, stk. 1, nr. 3, 4 og 7, § 9, stk. 2 og § 40, stk. 2 í løgtingslóg nr. 28 frá 10. mars 1994 um vinnuligan fiskiskap, sum broytt við løgtingslóg nr. 92 frá 13. juni 1995, løgtingslóg nr. 50 frá 20. mai 1996, løgtingslóg nr. 64 frá 20. mai 1996, løgtingslóg nr. 84 frá 6. juni 1997 og løgtingslóg nr. 69 frá 18. august 1998, verður ásett:

*Virkisøki*

**§ 1.** Kunngerðin skipar fiskiskapin eftir svartkjafti við fiskiførum undir føroyskum flaggi í 2014.

*Heildarkvota og býti av kvotuni*

**§ 2.** Fyri fiskifør undir føroyskum flaggi verður fyri 2014 fyribils ásett ein heildarkvota á 100.000 tons av svartkjafti. Fiskiskapurin kann fara fram í føroyskum sjógvi.

**§ 3.** Kvotan, sbrt. § 2, verður latin eigarum av fiskiførum undir føroyskum flaggi, sum í 2013 høvdu rætt til fiskiloyvi, sbrt. § 5, stk. 4, 1. pkt. í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap, til beinleiðis fiskiskap eftir svartkjafti í føroyskum sjógvi, ella fiskiførum, sum hesin rættur er fluttur á. Kvotan verður latin sum egin árskvota.

*Stk. 2.* Hevur fiskifar í 2013 fiskað av kvotu fyri 2014, samsvarandi treytunum í fiskiloyvinum í 2013, verður hendan veiðan mótroknað kvotuni hjá fiskifarinum fyri 2014.

*Stk. 3.* Fiskiførum verður heimilað at veiða av kvotuni fyri 2015 við upp til 10% av egnu árskvotuni fyri 2014. Veiða, sum er fiskað “a konto”, verður mótroknað tillutaðu kvotuni hjá fiskifarinum fyri 2015.

*Fiskiloyvi*

**§ 4.** Fiskiskapur eftir svartkjafti sambært hesi kunngerð kann bert fara fram við fiskiførum, sum lúka treytirnar eftir § 3, stk. 1, og sum eftir umsókn hava fingið fiskiloyvi til slíkan fiskiskap.

*Stk. 2.* Umsókn um fiskiloyvi skal sendast til Vørn.

*Stk. 3.* Í fiskiloyvið verða settar treytir og mannagongdir um regluligar fráboðanir o.a. sbrt. § 11, stk. 1 í lógini.

*Leiðir*

**§ 5.** Tað er ikki loyvt at royna eftir svartkjafti á teimum leiðum nevndar í stk. 2 og 3.

*Stk. 2.* Á landgrunninum innan fyri linjur drignar millum hesi støð og í hesi raðfylgju:

1) 62°50'00"N, 07°11'00"W
2) 62°53'00"N, 06°40'00"W
3) 62°50'00"N, 06°10'00"W
4) 62°43'00"N, 05°38'00"W
5) 62°32'00"N, 05°02'00"W
6) 62°25'00"N, 04°15'00"W
7) 62°19'00"N, 04°00'00"W
8) 62°01'00"N, 04°00'00"W
9) 61°17'00"N, 04°56'00"W
10) 60°26'00"N, 06°10'00"W
11) 60°26'00"N, 06°32'00"W
12) 60°35'00"N, 06°35'00"W
13) 61°23'00"N, 07°30'00"W
14) 61°25'25"N, 08°01'00"W
15) 61°32'48"N, 08°20'30"W
16) 61º49’00”N, 08º41'50"W
17) 62º00’00”N, 10º00'00"W
18) 62º40’00”N, 10º00'00"W
19) 62º40’00”N, 08º00'00"W
20) 62°50'00"N, 07°11'00"W

*Stk. 3.* Á Føroya Banka innan fyri linjur drignar millum hesi støð og í hesi raðfylgju:

1) 60°50'00"N, 07°57'00"W
2) 61°03'00"N, 07°57'00"W
3) 61°15'30"N, 08°16'00"W
4) 61°13'20"N, 08°42'12"W
5) 61°00'00"N, 09°11'00"W
6) 60°48'40"N, 09°25'00"W
7) 60°24'00"N, 09°07'00"W
8) 60°50'00"N, 07°57'00"W

*Reiðskapur*

**§ 6.** Tá svartkjaftur verður veiddur við uppsjóvartroli, mugu meskarnir í trolinum ikki fara niður um 35 mm.

**§ 7.** Trolið skal hava innsetta skiljirist, tá roynt verður eftir svartkjafti á leiðunum norðan fyri 60°20'00"N, og sunnan fyri eina linju drigna í ein beinan eystan úr punktinum 63°00'00"N, 06°00'00"W og út á fiskimarkið, og 315° rættvísandi úr punktinum 63°00'00"N, 06°00'00"W og út á fiskimarkið.

*Stk. 2.* Ristseksjónin skal setast inn framman fyri posan. Ristin skal hava rimar við í mesta lagi 55 mm millum hvørja. Hallið á ristini skal vera 45° - 60°. Op skal vera í netinum undir ristini. Opið skal vera breiddin á ristini og skal vera frítt soleiðis, at hjáveiða ótarnað sleppur út. Fylgiskjal 1 vísir skitsu av rist og ristseksjón.

*Umrokningarfaktorar*

**§ 8.** Við umrokning av fiski og fiskavørum til runda vekt skulu hesir umrokningarfaktorar nýtast fyri svartkjaft:
1) Kruvdur, við høvdi: 1,20
2) Kruvdur, avhøvdaður: 1,40
3) Flak við skræðu og beini: 2,80
4) Flak, uttan skræðu og bein: 2,80
5) Flak, uttan skræðu, við beini: 2,80
6) Fiskamjøl: 5,11

*Hjáveiða*

**§ 9.** Hjá fiskiførum, sum hava loyvi at fiska uppsjóvarfisk, sum er undir kvotuskipan, er hjáveiða av hesum fiskasløgum loyvd í beinleiðis fiskiskapi eftir svartkjafti. Hjáveiðan verður roknað av kvotuni hjá viðkomandi fiskifari.

**§ 10.** Samlaða hjáveiðan av fiskasløgunum toskur, hýsa, upsi og kongafiskur má fyri hvørja avreiðing ikki vera meiri enn 2% av samlaðu veiðuni.

**§ 11.** Fiskiveiðieftirlitið kann, við heimild í § 35, stk. 3 í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap, áseta bráðfeingis veiðibann, har hjáveiðan er meira enn ásetta hámarkið sbrt. § 10.

*Útblaking*

**§ 12.** Tað er ikki loyvt at blaka ella sleppa fiski útaftur.

*Sýni*

**§ 13.** Fiskiførn, ið fiska sambært hesi kunngerð, kunnu verða áløgd at taka sýni av veiðuni.

**§ 14.** Fiskiførn, ið fiska sambært hesi kunngerð, kunnu verða áløgd at gera kanningar av veiðuni, herundir av støðd, vekt og dygd.

*Revsing*

**§ 15.** Brot á § 4, stk.1, §§ 5-8, § 10 ella § 12 verða revsað við bót, um ikki harðari revsing er ásett eftir aðrari lóg. Á sama hátt verður tann revsaður, sum ikki fylgir boðum sbrt. §§ 13-14**.** Um brot er framt av partafelag, smápartafelag, lutafelag ella líknandi, kann felagið sum slíkt, sbrt. § 40, stk. 3 í lógini, verða revsað við bót.

*Stk. 2.* Sbrt. § 45 í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap kann Fiskiveiðieftirlitið beinanvegin taka inn fiskiloyvi, um skipari á fiskifari er skuldsettur fyri brot á hesa kunngerð, ella um fiskifarið ikki hevur hildið seg til treytir ásettar í fiskiloyvinum sambært hesi kunngerð. Fiskiloyvi kann verða tikið aftur upp til 4 vikur hvørja ferð.

*Gildistíð*

**§ 16.** Henda kunngerð kemur í gildi 1. januar 2014, og fer úr gildi 31. desember 2014.

Fiskimálaráðið, 19. desember 2013

**Jacob Vestergaard (sign.)**
landsstýrismaður

/ Rógvi Reinert (sign.)

**Fylgiskjal 1**

**Skitsa av rist og ristseksjón:**

Skiljiristin hevur sum endamál at skilja stóran fisk frá smáum og sleppa størra fiskinum út gjøgnum op í undirnetinum.




**Ristseksjón**

Ristseksjónin skal setast inn framman fyri posan. Ristin skal hava rimar við í mesta lagi 55 mm millum hvørja. Hallið á ristini skal vera 45° - 60°. Op skal vera í netinum undir ristini. Opið skal vera breiddin á ristini og skal vera frítt soleiðis, at hjáveiða ótarnað sleppur út.

